## Kiev vil hava Sheva

Nú er møguleiki fyri, at Andrej Shevchenko aftur fer at spæla við barndómsfelagnum. Tað var ein dreymur, tá framherjin skifti til Chelsea fyri trimum árum síðan, men hann fekk ongantíð sítt gjøgnumbrot í enskum fótbólti. – Vit eru sera áhugaðir í Shevchenko. Vit hava givið eitt tilboð og bíða nú eftir svari, sigur Valery Gazzaev, venjari hjá Dinamo Kiev, við Daily Mail. Roma og Monaco hava eisini sýnt framherjanum áhuga.



## Frem fer ikki á húsagang

Støðan hevur verið hættislig í danska fótbóltsfelagnum Frem seinasta mánaðan. Tað var um reppið, at felagið fór at húsagang, og seinastu vikurnar hevur leiðslan gjørt alt fyri at savna pening inn, soleiðis, at Frem verður bjargað frá at fara á húsagang. – Vit hava nú upphæddina, ið krevst fyri at bjarga felagnum. Vit hava stríðst og stríðst seinasta mánaðan, og tað er fantastiskt at síggja úrslitið nú, sigur Peter Hornbæk, ið er ein av íleggarunum, við danska Ekstra Blaðið.

# Kvinnurnar vístu se

**Føroysku svimjigenturnar setta alt og øll upp á pláss í svimjihøllini í Godby. Av teimum seks gullmerkjunum, sum vórðu fingin til høldar, áttu svimjigenturnar tær fimm**




Jákup Mørk

Á einum degi, sum byrjaði illa við diskaðu mansstafettini, bjargaðu føroysku genturnar føroyska svimjihýrinum, tá tær løgdu fimm gullmerkir afturat longu stóra savninum.

Hartil vann Pál Joensen eisini gullið, sum hann og øll onnur roknaðu við á 200 metrum.

Men tað vóru fyrst og fremst kvinnurnar, sum vístu seg sum menn, tá mest stóð á.

Mona Simonsen vann gull og setti bæði føroyskt og oyggjaleikamet á 800 metrum frí. Malan V. Bærendsen vann gull og setti føroyskt met á 400 metra blandað. Bjørg Seloy vann gull á 100 metur rygg. Shaila millum Garðarnar vann gull og setti føroyskt met á 50 metra frí, og so vann kvinnustafettin eisini ruddiliga í 4X50 metra frísvimjing, har tær eisini settu oyggjaleikamet.

Altso fimm gullmerki til føroysku svimjikvinnurnar, sum soleiðis fullkomuliga domineraðu svimjihøllina. Enntá somikið nógv, at allar føroysku kvinnurnar longu nú hava ognað sær í minsta lagi eitt gullmerki í part, nú komið er í helvt við svimjikappingina.



**Føroyska stafettin í 4X50 metra frí vann ein tryggan sigur. Her síggjast Birita Debes, Shaila millum Garðarnar, Guðrun Holm Jacobsen og Katarina S. Lamhauge við gyltu dropunum, sum verða lætnir fyri sigrar á Álandi**

Mynd: Álvur Haraldsen

## FINALURNAR TÝSDAGIN

**800 frí kvinnur:** Mona Simonsen 8:58.61, gull, føroyskt met og oyggjaleikamet
**400 blandað menn:** Pál Joensen 4:23.19, silvur og føroyskt met
**200 bringa kvinnur:** Malan V. Bærendsen 2:38.93, gull og føroyskt met
**200 bringa kvinnur:** Katarina Lamhauge 2:40.26, bronsa
**100 rygg kvinnur:** Bjørg Seloy 1:04.97, gull
**100 rygg kvinnur:** Birita Debes 1:05.34, bronsa og juniormet
**50 bringa menn:** Pál Joensen 29.72, silvur og føroyskt met
**50 firvald kvinnur:** Shaila millum Garðarnar 29.11, gull og føroyskt met
**50 firvald kvinnur:** Guðrun H. Jacobsen 29.57, bronsa
**200 frí menn:** Pál Joensen, 1.47,76, gull og oyggjaleikamet
**4x50 blandað kvinnur:** 1:58.86, gull, landsliðsmet og oyggjaleikamet (liðið: Birita Debes, Shaila millum Garðarnar, Guðrun Holm Jacobsen og Katarina S. Lamhauge)